# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

Fyri 30 árum síðan:

## Maskinmeistarar í 1978



Í juni 1978 fingu 11 maskinmeistarar prógv á Føroya Maskinskúla.

Fremra rað, f.v.: Hákun Andreasen, Klaksvík, Bergur Jacobsen, Tvøroyri, Martin Jacobsen, Porkeri, Tom Johannesen, Leirvík, og Rasmus Magnussen, Søldarfjørður.

Aftara rað f.v.: Eilif Mørkøre, Eiði, Carl Nielsen, Klaksvík, Ólavur Asafson Olsen, Søldarfjørður, Marner D. Petersen, Fuglafjørður, Pól Rasmussen, Søldarfjørður og Sonny Z. Zachariassen, Hov.

*Kelda: Myndaárbókin "árið ið fór 1978"*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Óli Kurt Hansen, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin, 73 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Óla, kunna lata Hjartafelagnum eina gávu, konta í peningastovnunum.

Kistan við **Henry Christophersen** fer úr Landssjúkrahúskapellinumhóskvøldið 19. juni kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju fríggjadagin 20. juni kl. 15. Tey, ið vilja minnast Henry, kunnu lata eina gávu til Missiónshúsið í Vestmanna, konta í peningastovnunum.

**Jens Cramer, Århus**, andaðist mánadagin 16. juni, 68 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin 21. juni klokkan 10.00 frá Vor Frue Kirke, Vestergade 21, 8000 Århus C.

Anna Elisabeth Vang, Tórshavn, vanliga nevnd Lillan í Grønlandi, andaðist sunnudagin 15. juni, 90 ára gomul.

## Tøkk



Eina stóra tøkk bera vit tykkum øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða dóttir okkara

**Unn Hansdóttir**

varð tikin heim til Harran.

**Jannet, Hans Andrias, Niklas og Døgg**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Marna Hansen**
Leirvík

lá sjúk, andaðist og var jarðað.
Ein serstøk tøkk til sjúkrasystrarnar, heimahjálp og onkologisku deild.
Tøkk til talarar, prest og sangara fyri góð og troystarík orð.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur.
Hjartans tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini og við ervinum.
Takk til tykkum øll, ið fylgdu mammu til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Maria, Sofus, Joan, Julian, Vibeka og Tove**

**Dagurin**
**20. juni. Sylverius**. deyður ár 537. Hann var sonur pávans Hormisades og gjørdist seinni sjálvur pávi, men av politiskum grundum varð hann skjótt frákoyrdur. Navnið merkir Skógarbúgvi.

†

Kæra kona, mamma og vermamma, omma og langomma okkara

**Elin Maria Berg Jacobsen**
Søldarfjørður
(fødd í Froðba)

andaðist týsdagin 17. juni á Landssjúkrahúsinum, 84 ára gomul.
Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin kl. 16.00
Jarðarferðin verður úr Elim í Søldafirði leygardagin kl. 14.00

*Fyri tey avvarðandi*
**Dávur**
**Elma, Oðny, Sunnuvá og Malan**

Tey, sum ynskja at minnast Mariu við blómun ella kransum, kunnu í staðin lata eina gávu til barnalegurnar við Ástjørn í Íslandi, konta í Norðoya Sparikassa.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá góði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Ólavur A. Olsen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.
Vit takka starvsfólkunum á B7, B6 og G4, heimarøktini og øllum, sum vóru um hann teir seinastu mánaðarnar.
Takk tit, sum hjálptu til við jarðarferðina, fyri blómur, kransar og heilsanir.
Takk tit, sum bakaðu og á annan hátt hjálptu til við ervinum.
Takk, øll tit, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Oda**
**Heri, Ove, Kári við familjum**